Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðulsfólk til Stuðulstoymið í Suðurstreymoy

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir stuðulsfólki til Stuðulstoymið í Suðurstreymoy 40 tímar um vikuna frá 1. september 2008 fyribils til 1. mars 2009 við møguligari leingjan til 1. august 2009.

Stuðulstænastan hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan til brúkarar um alt landið. Toymið er ein tvørfakligur starvsfólkabólkur við 2 pedagogum, 1 ergoterapeuti, 1 heilsuatstøðingi og 1 hjálparfólki. Toymið heldur til í hølunum hjá Stuðulstænastuni í Bókbindaragøtu 8 í Havn. Málbólkurin hjá toyminum er heimabúgvandi fólk omanfyri 18 ár, ið hava ein skerdan sálarligan og likamligan virkisførleika.

**Arbeiðið hjá toyminum fevnir um:**
- At stimbra og menna praktiskar og sosialar førleikar hjá brúkaranum.
- At skipa so fyri, at brúkarin fær møguleika at leggja gerandislív sítt soleiðis til rættis, at tað verður í samsvar við egnan tørv og normar.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta, at tú:
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans og samstundis kann átaka tær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión.
- Er sterkur bæði til likams og sálar.
- Hevur eina viðkomandi útbúgving og royndir innan økið.

Umsøkjarar, ið hava útbúging sum pedagogar, heilsuhjálparar, ergo- og fysioterapeutar og starvsfólk við líknandi útbúgving hava fyrimun til starvið. Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá pedagogfelagum.

**Stuðulstænastan bjóðar:**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp
- Kunning í arbeiðinum og supervision

**Setanartreytir:**
Talan er um eitt avloysarastarv vegna barnsburð. Roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld- og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Hermann Mortensen, økisleiðara, ella Fíu Jespersen, samskipara, á tlf. 360000.

**Umsókn:**
Send eina umsókn við prógvi, upplýsing um útbúgving og møguligum viðmælum til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað.: Regin Johansen, deildarleiðari

**Umsóknarfreist: 8. august 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Sambýlið í Smærugøtu 29

Søkt verður eftir pedagogi til Sambýlið í Smærugøtu 29 til setan 1 sept ella eftir nærri avtalu. Fólk við heilsurøktarútbúgving hava eisini møguleika fyri at søkja. Talan er um fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum. Arbeitt verður í dag-,kvøld-, nátt- og vikuskiftisvaktum (3. hvørt vikuskifti) og serstakar frídagar

Sambýlið ì Smærugøtu 29 er heim hjá 4 fólkum við menningartarni. Endamálið er at skapa eitt trygt, mennandi heim og umhvørvi fyri hvørt búfólk. Í Sambýlinum eru 9 starvsfólk harav 6 hava útbúgving.

**Førleikakrøv:**
- vera sálarliga og likamliga væl fyri
- kunna taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðnum

**Vit bjóða:**
- supervisión og menningarmøguleikar.
- ávirkan á innihaldið í starvinum

**Setanartreytir:**
Starvið er sáttmálasett pedagogstarv, sum verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Um pedagogur, ið framman-undan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Verður starvsfólk sett við aðrari útbúgving enn pedagogur, verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Julionnu Næs Olsen, leiðara, á tlf. 224177

**Umsókn:**
Umsókn við próvskjølum, viðmælum og C.V. skal sendast til:

Sambýlið í Smærugøtu
Smærugøta 29
100 Tórshavn
Stílað: Julianna Næs Olsen, leiðari

**Umsóknarfreist: 8. august 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Ov tíðliga í verðina



Í Prematurfelagnum stuðla og ráðgeva vit foreldrum at ov tíðliga føddum børnum.

Telefonlinja okkara svarar mánadag til hósdag á tlf 263868

Eisini ber til at skriva til okkara á prematur@post.olivant.fo

JENS MARNI
THE RIGHT WAY
FLÓGAN FÆST NÚ



WWW.MYSPACE.COM/JENSMARNI